# Innanduraarkitektur knýttur at Idé-møblum

**Í nýggja bygninginum hjá Føroya Tele er einki tilvildarligt, hvat ið innrættingini viðvíkur. Innbúgvið er frá Idé-møblum, og Idé hevur eisini fingið samband við ein innanduraarkitekt, sum hevur verið við í innrættingararbeiðnum á Føroya Tele**

INNRÆTTING
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin.fo*



*Innanduraarkitekturin Nemery Pascale uttan fyri bygningin hjá Føroya Tele, sum hon hevur innrættað. Tað er í samstarvi við Birgir Andreasen í Idémøblum, at hon er komin higar. Í framtíðini er ætlanin, at samstarvið skal halda fram, og vanligi føroyingurin skal eisini kunna gera sær dælt av vitan hennara*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Nemery Pascale hevur seinasta árið havt samband við Birgir Andreasen hjá Idé møblum. Hon er innanduraarkitektur, og hevur sína egnu teknistovu í Keypmannahavn, har hon arbeiðir sum freelance arkitektur.

Ein dagin ringdi Birgir Andreasen frá Idé-møblum til hennara. Tað bleiv byrjanin til eitt langt og sera gott samstarv teirra millum.

– Birgir hevði bjóðað seg fram sum møblaleverandør til Føroya Tele. Merkið, ið kontórmøblarnir skuldu vera av, eitur Montana. Birgir setti seg í samband við Montana møblar, og bað teir um at ávísa ein innanduraarkitekt. Teir vístu á meg. Og soleiðis kom samstarvið í lag, greiðir Nemery Pascal frá.

## Stórrúmskontór

Pascale var alt fyri eitt sera áhugað í samstarvinum.

Upprunaliga var ætlanin, at hon bert skuldi koma við einum uppleggið til, hvussu innbúgvið skuldi setast, men samstarvið menti seg skjótt til at gerast mundandi meiri umfatandi enn so.

– Hatta er jú ein fantastiskur bygningur, sum nú verður únyttaður á bestan hátt. Vit hava tað, ið verður nevnt stórrúmskontór. Tað vil siga, at tað er eitt stórt rúm, har øll hava sítt skriviborð. Man er farin frá at hava smá privatkontór, nú savnar man øll í einum felagshøli, greiðir Nemery Pascale frá.

Hon sigur, at henda skipanin skuldi gjørt arbeiðsumhvørvið og arbeiðssemið betri.

– Tað verður nógv lættari at nýta know-how hjá hvørjum øðrum, um tað ikki eru fysiskar forðingar ímillum arbeiðsfólkið. Tað vísir seg nevniliga, at um fólk skulu ígjøgnum eina afturlatna hurð, fyri at spyrja um ráð ella hjálp, so setast tey ofta aftur. Hurðar virka sum forðingar fyri samstarvi, sigur Nemery Pascale.

Hon leggur tó dent á, at um stórrúmskontór skulu vera effektiv, er neyðugt við neyvari tilrættislegging. T.d. ber jú ikki til, at telefonfólk, sum larma relativt illa, skulu sita saman við fólki, sum mugu hava arbeiðsfrið.

– Vit hava arbeitt nógv saman við starvsfólkinum á Føroya Tele. Tey hava verið røsk at komið við konstruktivum kritikki, og saman haldi eg, at vit hava funnið fram til bestu loysnina, staðfestir Nemery Pascale.

Hon sigur, at eitt, sum onkuntíð gerst ein vansi við stórrúmskontórum, er, at leiðslan velur at seta alt starvsfólki saman, meðan stjórarnir framvegis vilja hava síni privatkontór. Hetta skapar ofta fjarstøðu ímillum starvsfólk og stjórn, men hetta var eingin trupulleiki á Føroya Tele.

– Tá leiðslan í einum virki setur seg saman við starvsfólkinum í eitt stórrúmskontór, sendir hon nøkur ógvuliga góð signal út. Starvsfólkið kann ikki annað enn hugsa, at um leiðslan kann, so kann eg eisini. Tað er eitt gott fyridømi, sum leiðslan á Føroya Tele so dyggiliga vísti, staðfestir Pascale.

## Himmalin og havið

Men tá ið alt kontórinnbúgvið var funnið og ein ætlan var gjørd um hvussu alt skuldi setast upp, fekk Nemery Pascale tillutað nýggjar uppgávur.

– Samstarvið gekk so fyrimyndarliga væl. Øll vóru opin fyri nýggjum hugskotum, og tey tyktust vera glað fyri ráðini og vegleiðingarnar, ið eg gav teimum. Í Danmark kanst tú ikki læra nakran nakað, tí øll vita best sjálvi, og tí er tað so fantastiskt at arbeiða í Føroyum, tí her fyrigongur alt í einum sera positivum anda.

Pascale endaði við at ráðgeva um bæði litir, snið, innrætting av kontór-møblum og innrætting av smálutum, sum t.d. ringbindum, ja snøgt sagt um nærum alt, ið hevði við innrættingina at gera.

Hon sigur, at loysunarorðið í arbeiðnum allatíðina hevur verið flexibilitetur.

Øll starvsfólkini hava eitt skrivaraborð, sum kann hækka og lækka í hædd, og eina reol, við øllum viðkomandi pappírum.

– Hetta er eitt umhvørvið við nógvum samarbeiði og nógvum fundarvirksemi ímillum hesar ymsu deildirnar. Vit avgjørdu tí at seta hjól undir alla skrivstovútgerðina, soleiðis, at tað er gjørligt at taka sína reol við, t.d. upp á næstu hædd, har samarbeiði skal vera í nakrar dagar. So hava tey alt sítt hjá sær, og tá samarbeiðið er liðugt, trilla tey bara alt upp á páss aftur, greiðir Pascale frá.

Hon sigur, at við at geva øllum lutunum hjól, verður rúmið eisini nógv lættari. Tað fær eina sveimandi effekt.

– Tað, sum er so heilt ófatiligt við hesum bygninginum, er útsýnið. So tað havi eg valt, skal vera tað berandi í innrættingini. Tað skulu vera liturin á himmalinum og á haganum uttanum bygningin, ið skulu vera dominerandi. Og tað haldi eg, hevur eydnast sera væl.

## Eisini privatar kundar

Men hóast Føroya Tele bygningurin nú væl og virðiliga er fingin frá hondum, endar samstarvið ímillum Idé-møblar á Hálsi og Nemery Pascale ikki her.

– Vit hava bygt eitt ótrúliga gott samstarv upp, og tað vildi verið synd um tað alt fór fyri bakka nú. So hetta er avgjørt nakað, ið vit fara at byggja víðari uppá, staðfestir Pascale.

Hon sigur, at tey longu nú hava nøkur rættiliga fastløgd framtíðar projekt í huganum, men at tey ikki verða almannakunngjørd enn. Talan hevur tó eisini verið um, at privatfólk skulu kunna gera sær dælt av stóru vitan Pascales um innrætting.

– Tað er ikki óhugsandi, at eisini privatfólk fara at kunna seta seg í samband við Birgir Andreasen, um tey ynskja at fáa meg at hjálpa til við at inrætta húsini. Tað er ikki so vanligt í Føroyum at nýta innanduraarkitektar, men eg merki væl, at áhugin er sera stórur. Meðan eg havi arbeitt við Føroya Tele, hava nógv privatfólk spurt meg um ráð, og sýnt arbeiðnum stóran áhuga. So tað verður møguliga eitt tilboð í framtíðini, sigur hon.

Hon sigur, at tað er so lætt at ferðast landanna millum og at halda sambandið um telefonina, at tað ikki fer at krevja, at hon búsetur seg her.

– Eg fari at ferðast aftur og fram ímillum londini, og framvegis hava mína teknistovu í Keypmannahavn. Hvussu nógv eg fari at vera her, veldst alt um, hvussu stórur eftirspurningurin verður, sigur Nemery Pascale, innanduraarkitektur, at enda.



*Her er Nemery Pascale í einum av fundahølunum hjá Føroya Tele. Pascale gleðist um, at samstarvið gjørdist meiri umfatandi enn upprunaliga ætlað. – Arbeiðið hevur gingið so ótrúliga væl, og øll hava verið yvirraskandi positiv allan vegin, sigur hon.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



# Fleiri enn túsund fólk vitjaðu Føroya Tele

**Fríggjadagin var stórfingin móttøka í nýggja bygninginum hjá Føroya Tele. Áhugin fyri at síggja snotuliga bygningin var ovurhonds stórur, tí fleiri enn 1000 vóru á gólvinum**

NÝGGJUR BYGNINGUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Stjórin á Føroya Tele, Andras Róin, er ógvuliga væl nøgdur við nýggja bygningin hjá fyritøkuni, og hann ivast ikki í, at hølini fara at styrkja samanhaldið í fyritøkuni.*
*mynd: Jens Kr. Vang*

Leingi hevur verið bíðað í spenningi eftir, at nýggja høvuðssætið hjá Føroya Tele í Hoyvík alment skuldi takast í nýtslu. Fríggjadagin var so stóra løtan komin, tá ið bygningurin varð vístur fram fyri almenninginum, og áhugin var stóru.

## Errin starvsfólk

Stjórin á Føroya Tele, Andras Róin, sigur, at eftir hansara tykki gekk móttøkan sera væl. Hvussu nógv fólk stukku inn á gólvið, dugir Andras Ròin ikki at siga heilt nágreiniliga, men hann metir, at talan hevur verið um eitt stað millum 1000 og 2000 vitjandi, og tað eru vit ógvuliga fegin um, sigur hann. – Gott og væl 700 fólk hava skrivað í gestabókina hjá okkum, men tað vóru langt frá øll, sum komu framat gestabókini, og tí eri eg sannførdur um, at talið av vitjandi hevur verið eitt gott petti oman fyri tey 1000, sigur Andras Róin.
Spurdur hvussu hann og starvsfólkini eru nøgd við nýggja bygningin, svarar Andras Róin: – Eg haldi, at vit øll eru stak væl nøgd. Eg legði til merkis fríggjadagin, at starvsfólkini høvdu hug til at vísa bygningin fram fyri fólki, og tað tulki eg bert sum eitt tekin um, at tey eru errin av nýggju hølunum, sigur stjórin á Føroya Tele.

## Stór avbjóðing

Í føroyskum høpi er byggi- og innrættingarstílurin í nýggja høvuðssætinum hjá Føroya Tele rættuliga slóðbrótandi. Serliga hevur nógv verið tosað um, at bygningurin er innrættaður soleiðis, at øll starvsfólkini sita í sama rúmi. Ongar smærri ella størri skrivstovur eru, og tað eru fleiri, ið hava verið rættuliga ivandi hesum viðvíkjandi. Andras Róin sigur tó, at tað tykist sum um, at fólk eru positivt yvirraskaði av hesum.

– Eg haldi, at fólk eru glað um opna landslagið, sum innrættingarstílurin verður róptur, og eg ivist ikki í, at hetta fer at styrkja mentanina í fyritøkuni. Samstundis merkir hetta, at vitan og kunning kemur nógv skjótari runt millum starvsfólkini, og tað kann bara verða ein styrkur, sigur Andras Róin.

Stjórin á Føroya Tele vísir á, at við at innrætta á ein slíkan hátt, verður gólvplássið nógv størri, men samstundis er talan um eina stóra avbjóðing, tí at starvsfólkini skulu venja seg við, at tey ikki longur sita einsamøll á einari skrivstovu.

## Gott fyri samanhaldið

Áðrenn flutt varð í nýggju hølini hava starvsfólkini hjá Føroya Tele verið spjadd í fleiri ymiskum bygngingum. Nú eru øll savnað undir somu lon, og tað fegnast Andras Róin um: – Vit hava verið spjadd í einar seks ymiskar bygningar, men nú eru vit øll her á nyggja høvuðssætinum. Hetta er uttan iva ein styrkur fyri samanhaldið í fyritøkuni, og vónandi fer tað at speglast aftur á trivnaðinum, sigur Andras Róin. Eini 170 starvsfólk hava sína dagligu gongd í nýggja høvuðssætinum. Okkurt um 120 av hesum eru fólk, sum burturav sita á skrivstovuni, meðan restin er eitt nú montørar, sum eru nógv úti hjá kundum.



*Jákup Veyhe undirhelt fyri teimum mongu gestunum á móttøkuni.*
*mynd: Jens Kr. Vang*



*Føroyski songfuglurin í Danmark, Petsy Tvørfoss, bergtók teir mongu gestirnar við sínari vøkru rødd.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*




*Serligar Føroya Tele køkur vóru eisini gjørdar til hátiðarløtuna fríggjadagin*

*Mynd: Jens Kr. Vang*